Fuglafjarðar Sjónleikarfelag:

# 63 limir krevja eykaaðalfund

**Tey, sum eftir eru í nevndini, hava onga viðmerking til støðuna, sum hevur tikið seg upp**

MENTANARHÚSIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Á eykaaðalfundinum í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag verða eftir øllum at døma fleiri mál á skránni*

Eftir at formaðurin, næstformaðurin og annar eykalimurin í nevndini í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag tóku seg úr nevndini, hava tey, sum eru eftir í nevndini, avgjørt ikki at úttalað seg alment um viðurskiftini í felagnum.

Páll Larsen, sum situr í nevndini, sigur við Sosialin, at hetta er ein støða, tey hava tikið, tí tey halda ikki, tað tænir nøkrum endamáli at fara í fjølmiðlarnar við hesum.

Í Sosialinum í gjár var samrøða við fráfarna formannin, Eyðun Hansen, og síðan tá hevur onkur vent sær til blaðið og sagt, at vit bert lýstu málið frá teirri eini síðuni.

Sosialurin vildi fegin lýst viðurskiftini frá báðum pørtum, men sum skilst á Pálli, fer eingin av verandi nevndarlimum at úttala seg.

Tey, ið eftir eru í nevndini, eru Sofus Gregersen, Páll Larsen, Ingun N. Olsen og Unn Petersen.

### Eykaaðalfundur

Nú verður so eykaaðalfundur í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag, fríggjadagin, 24. oktober.

Tað eru 63 limir í felagnum, sum hava kravt, at aðalfundur verður hildin. Sambært brævinum, sum limirnir hava skrivað undir, er málið við fundinum at fáa greiði á støðuni, sum hevur tikið seg upp, nú nevndin ikki er fullmannað. Limirnir vilja eisini hava svar uppá ymiskar spurningar, sum tey halda ikki eru nóg væl lýstir.

Sum skilst, helt sitandi nevnd í Sjónleikarfelagnum tað ikki vera neyðugt við eykaaðalfundi, tí regluligur aðalfundur verður kortini fyrst í komandi ári.

Men sambært lógum felagsins kann eitt ávíst tal av limum krevja eykaaðalfund, og tað er hetta, sum gjørt er.

### Fleiri mál

Í kravinum um eykaaðalfund, sum hesir 63 limirnir hava skrivað undir, verður dentur lagdur á, at nevndin ikki longur er fullmannað, og at samstarvið millum nevndina og leiðsluna í húsini er hildið uppat.

Tey, sum hava skrivað undir kravið um eykaaðalfund, heita á sitandi nevnd um at taka hesi mál upp:

1. Viðgerð av undrunarverdum viðurskiftum í nevndini
2. Val á síðsta ársaðalfundi
3. Átalur sambært grein 4, stk. 2 í lógini
4. Nýval av nevnd
5. Viðgerð av uppsøgn av samstarvinum við leiðaran
6. Ymiskt

# Hugnakvøld við eydnuhjóli á Toftum

**Á skránni verður eitt nú felagssangur, kórsangur og spurnarkapping um gamlar lutir**

HUGNAKVØLD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

**Toftir:** Leygardagin, 25. oktober, skipar Fornminnisfelagið í Nes kommunu fyri almennum eydnuhjóli og hugnaløtu á Svangaskarði. Lagt verður fyri kl. 19.30.

Umframt "lykkehjul – sum í gomlum døgum", sum stigtakararnir siga, verður mangt áhugavert og skemtiligt á skránni hetta kvøldið.

Har verður kaffi, køkur, felagssangur, kórsangur og spurnarkapping um gamlar lutir.

### Stuðul

Fornminnisfelagið sigur, at tey, sum vilja stuðla felagnum við at lata ein lut til eydnuhjólið, kunnu venda sær til ein av nevndarlimunum í seinasta lagi mánadagin, 20. oktober.

Nú um dagarnar selir felagið eisini lutaseðlar til frama fyri felagið.

Tey, sum sita í nevndini í Fornminnisfelagnum í Nes kommunu, eru Jógvan I. Olsen, Josefina Jacobsen, Karl Johannesen, Beinta Dahl og Regin Debess.



*Gamli prestagarðurin á Nesi er karmur um virksemið hjá Fornminnisfelagnum í Nes kommunu.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Orkis by night á Glyvrum

**Í kvøld letur ein forvitnislig framsýning – Orkis by night - upp í kjallaranum í blómuhandlinum á Glyvrum**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rannvá í Baiansstovu, sum er designari og eigur Faroese Fashion, fer at sýna fram ymiskar vørur, sum hon evnar úr føroyskari ull. Samstundis fer Orkis at sýna fram nýggjar vørur, sum júst eru heimkomnar.
Í Orkis siga tey, at tað serliga eru ymiskar vørur úr glasi, sum eru frammi í dag, og talan er bæði um klárt glas, jarðlitt, ráhvítt og svart glas.

Rannvá ger bæði troyggjur, jakkar, draktir og ymiskar aðrar vørur úr ull. Hon evnar eisini vørur eftir serstakari bílegging, og tá er tað bert hugflogið sum setir mørkini.

Orkis og Faroese Fashion hava áður havt framsýning saman í Ribarhúsi í Fuglafirði.



*Í kvøld letur forvitnislig framsýning upp í Orkis Glyvrum – Orkis by night. Opið verður til kl. 22. Framsýningin verður opin restina av vikuni.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Blómuhandilin á Glyvrum er ikki minst kendur fyri sínar serstakliga vøkru blómubindingar, og tað eru ikki minst hesar, sum fara at prýða framsýningarhølið á Glyvrum, tá ið latið verður upp í kvøld kl. 19.

Í kvøld verður framsýningin opin til kl. 22, í morgin frá kl. 9.00-19.00 og leygardagin frá kl. 9-15.

### List og jól

Leggjast kann aftrat, at málningaframsýning verður í Orkis í november, har Jóannes S. Hansen og Sámal Toftanes fara at sýna fram síni listaverk.

Eins og undanfarin ár, fer blómuhandilin eisini í ár at hava vælumtóktu jólastovuna í kjallaranum á Glyvrum.



# Neyðugt við nýggjari lóggávu um fosturtøku



*Andrias Petersen er ikki nógv fyri brævinum, hann hevur fingið frá landsstýrismanninum í heilsumálum. Tað er eitt stak óheppið tekin at senda kommunulæknunum, at teir ikki halda lógina, og tað er at meta sum eitt misálit, sigur kommunulæknin í Norðagøtu.*

*Mynd: Savnsmynd*

**Andrias Petersen, løgtingslimur og kommunulækni, heldur, at fosturtøkulóggávan frá 1956 ikki fylgir við tíðini. Hann metir, at fosturtøkulóggávan skal endurskoðast, so hon stendur í mát við tíðarandan í dag.**

FOSTURTØKA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Løgtingslimurin og kommunulæknin í Norðagøtu, Andrias Petersen, heldur, at tíðin nú er búgvin til nútímansgera fosturtøkulóggávuni frá 1956. Hann gongur tí móti ætlanini hjá landsstýrismanninum í heilsumálum, Bill Justinussen, ið hevur sent kommunulæknunum skriv um, at teir skulu fylgja lógini meira nágreiniliga. Galdandi lóggáva í Føroyum er frá 1956, og sambært Andriasi Petersen, fylgir lógin ikki við tíðini.

– Okkara lóggáva er frá 1956, og er ongantíð broytt síðan. Hon er 50 ára gomul, og hon trongist avgjørt til eina revidering. Tíðarandin er heilt øðrvísi í dag, og orðingarnar í lógini eru gamlar og standa ikki í mát við tíðarandan í dag, sigur Andrias Petersen.

Sjálvur tekur Andrias Petersen ikki undir við fríari fosturtøku, men sigur seg vilja hava skipað viðurskifti á økinum. Hann vísir á, at tað er neyðugt at halda seg veruleikan, at umstøðurnar eru øðrvísi í dag, enn tá lóggávan varð smíðað.

– Persónliga kenni eg hvørki nakran persón ella flokk, sum tekur undir við fríari fosturtøku. Vit liva í einum fríum samfelag, har vit eiga at hava virðing fyri einstaklinginum. Vit skylda kvinnunum ta virðing, at vit hava eina lóggávu, sum er tíðarhóskandi, og sum tryggjar trygg og skipað viðurskifti á økinum, greiðir Andrias Petersen frá.

Útalilsini hjá landsstýrismanninum eru alt annað enn heppin í samband við fosturtøkuspurningin. Andrias Petersen spyr seg sjálvan í hesum døgum, hvat tær kvinnur, ið hava tikið truplu avgerðina um fosturtøku, hugsa, nú tær nærmast verða gjørdar til at vera kriminellar. Hann heldur, at úttalilsini er at meta sum steinur oman á byrðu hjá teimum.

### Bróta ikki lógina

Kommunulæknin í Norðagøtu er ikki nógv fyri brævinum, hann fekk sendandi frá Bill Justinussen. Andrias heldur, at kommunulæknarnir í Føroyum halda lógina, hóast landsstýrismaðurin sipar til nakað annað.

– Tað er eitt keðiligt tekin at senda okkum, at vit ikki halda lógina, og tað er taka sum eitt misálit. Eftir mínum tykki hava vit øll árini hildið lógina, og hevur Bill Justinussen ella landsstýrið ein trupulleika við mannagongdini, so kann Bill gera tvey ting. Hann kann fáa landslæknan upp í leikin, ið hevur eftirlitsmyndugleikin á økinum ella, at hann leggur uppskot í tingið um at broyta lógina, sigur Andrias Petersen.

Javnaðartingmaðurin er ikki samdur í tulkingini hjá landsstýrismanninum av fosturtøkulógini. Hann metir, at lógin er avgjørt ein tulkingarspurningur. Bill Justinussen hevur alment sagt, at fosturtøkur kunnu bert fremjast um talan er um neyðtøku ella heilsuvanda hjá kvinnuni, men hesum sjónarmiðjum tekur Andrias Petersen ikki undir við.

– Í lóggávuni stendur eisini um psykisku og fysisku støðuna hjá kvinnuni, og tá er støðan opin hjá kommunulæknanum, um hann velur at játta fosturtøkuna. Lógin er eftir mínum tykki formulera sum ein tulkingarspurningur, sigur kommunulæknin.

### Onnur misunna okkum

Í blaðnum mánadagin vístu vit á, at sambært hagtølunum eru føroyingar langt niðastir, tá talan er um fosturtøkur í Norðanlondum. Andrias Petersen rør eisini framundir hesi tøl, og sigur at onnur lond misunna føroyingum fyri fáu fosturtøkurnar

– Føroyska lóggávan er restriktiv, men umsitin liberalt. Í samband við fosturtøkur eru kvinnurnar ofta í viðtalu hjá kommunulæknunum 2-3 ferðir, áðrenn endaliga støða verður tikin. Eg haldi, at lógin er væl umsitin, og tí ger Bill Justinussen fosturtøkurnar í Føroyum til ein trupulleika, ið als ikki er til staðar. Talan er um ein sonevndan falskan trupulleika, og hagtølini stuðla eisini tí, sigur Andrias Petersen.

### Ikki av tilvild

Javnaðartingmaðurin heldur ikki tað verða av tilvild, at fosturtøkuspurningurin aftur er í hæddini

– Tað er ikki av tilvild, at fosturtøkan verður tikin fram júst nú. Hví skal landsstýrismaðurin senda bræv til okkum, nú tá fíggjarlógin er til viðgerðar? Tað er fyri at sløra fyri allar trupulleikarnar við fíggjarlógini, at málið er tikið framm júst nú. Tað er strategiskt frá samgonguni, at týdningarmikil mál sum fíggjarlógin fer í bakgrundina í fjølmiðlunum, og fjølmiðlarnir hoppa eisini upp á tað. Eg haldi bara tað er stórt spell, at so álvarsamt mál, sum fosturtøka verður nýtt soleiðis, tí tað er tað alt ov týdningarmikið til, sigur Andrias Petersen at enda.





*Andrias Petersen sigur, at Bill Justinussen ger fosturtøkurnar til ein trupulleika. Onnur lond misunna okkum fyri fáu fosturtøkurnar í Føroyum, og tí eru fosturtøkurnar ein falskur trupulleiki í Føroyum, sum ikki er til staðar, sigur hann*

*Kelda: Hagstova Føroya*

# Evnisdagur um fosturtøku

**Føroya Pro Vita fer leygardagin at skipa fyri evnisdegi um fosturtøku. Bente Holmgaard úr Danmark skal halda tríggjar fyrilestrar um ráðgeving innan fosturtøkuspurningar.**

EVNISDAGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Kjakið um fosturtøku er aftur í hæddini. Heita evnið er javnan uppi og vendur, og seinastu vikuna hava serliga fjølmiðlarnir varpað ljós á evni. Fosturtøka er eitt evni, ið flestu føroyingar hava ein støðu til, og tí er ein evnisdagur um evnið rættiliga viðkomandi í hesum døgum.

Føroya Pro Vita er felagið, ið virðir rættin hjá ófødda barninum. Felagið skipar leygardagin fyri evnisdegi um ráðgeving í fosturtøkuspurningum. Evnisdagurin verður skipaður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Í samband við evnisdagin, kemur Bente Holmgaard úr Danmark at halda tríggjar fyrilestrar. Heitið á fyrilestrunum eru:

1) Hvussu meinigheitir ella samkomur kunnu gera mun í okkara samfelag
2) Hvussu kenslur fáa mál í ráðgevingini
3) Hvussu trívist ein best sum ráðgevi

Bente Holmgaard er útbúgvin lærari og er leiðari á fosturtøkutelefonini hjá felagsskapinum "Retten til liv" í Danmark

Evnidagur er almennur og byrjar kl. 10